## Martin og Hinir á Asfalt

Altíð aktuelli og viðkomandi Martin Joensen verður millum teirra, sum fara á pall á Asfalt í ár. »Hinir« sum eru saman við Martini eru Eyðun Mohr Hansen, Martin Joensen, Jónleif Jensen, Pauli Magnussen og Jákup Zachariassen. Stílurin kann sigast at vera vísukendur fólkarokkur í stíl við Neil Young, Bob Dylan og Kára P. Í fjør gav bólkurin út frálíku fløguna "Á Brúnni", og luttóku Martin Joensen og Hinir á flestu føroysku festivalunum.

## Føroyskur tónleikur stendur seg væl

Meira enn helmingurin av sangunum á 15 teimum bestu hesa vikuna eru føroyskir. Páll Finnur Páll er á toppinum, og Eyðun Nolsøe kom sum eitt strok inn á listan Føroyskur tónleikur hevur tað gott á 15 teimum bestu í løtuni. 8 av 15 sangum, sum eru á listanum hesa vikuna, eru føroyskir. Páll Finnur Páll er aftur hesa vikuna ovast á listanum við sanginum Mín Russiski Vinur, og í hølunum á teimum er Eyðun Nolsøe. Eyðun Nolsøe gav herfyri nýggja fløgu út, og sangurin Hvønn Dag er hástøkk á listanum hesa vikuna. Onnur føroysk nøvn á listanum eru Rannvá Jacobsen, Eivør Pálsdóttir, Boys In A Band og Sic.

# Havnin rænir valdið í SEV

**Kollveltandi broytingar í bygnaðinum av SEV eru ávegis. Broytingar, sum hava við sær, at eitt umboð frá Tórshavnar kommunu situr við nærum helminginum av atkvøðunum til aðalfundin**



SEV
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Í morgin, fríggjadagin, verður umboðsnevndarfundur hjá SEV. Á hesum fundi skal støða takast til uppskot um broytingar av viðtøkunum. Stórar og avgerandi broytingar av viðtøkum, sum bara eru tvey ára gamlar.

Høvuðsbroytingarnar í mun til galdandi viðtøkur eru, at umboðsnevndin verður til ein partafelagslíknandi aðalfund, har hvør limakommuna møtir við einari fulltrú og við atkvøðutali í mun til fólkatalið í viðkomandi kommunu. Hetta merkir við øðrum orðum, at eitt umboð frá Havnar kommunu møtir við umleið 20.000 atkvøðum, og eitt frá Fugloyar kommuna við umleið 50 atkvøðum.

Í mun til galdandi viðtøkur er her talan um ógvusligar broytingar. Higartil hevur tað verið soleiðis, at hvør kommuna hevur havt ein umboðsnevndarlim fyri hvønn 1000 íbúgva. Um vit taka dømi aftur við Tórshavnar kommunu, so hava teir havt 20 umboðsnevndarlimir. Hesir hava tó ikki allir somu meining, og heldur ikki er nakað garanti fyri, at allir møta. Tískil fær Tórshavnar kommuna nógv størri slagkraft við nýggja viðtøkubroytingaruppskotinum, har eitt umboðar allar 20.000 atkvøðurnar, heldur enn at 20 limir hvør í sínum lagi atkvøða eftir síni sannføring. Valdið hjá Tórshavnar kommunu veksur øgiligt við hesi broyting, tí fáa teir eina stóra kommunu aftrat, Klaksvík ella Runavík, so hava teir meirilutan og harvið valdið.

Ein onnur broyting verður, at stýrið í SEV verður broytt til eina nevnd, sum verður vald á aðalfundi. Valið fer fram á tann hátt, at hvørt økið velur síni umboð. Nevndin fær 11 limir, sum eru býttir upp á økir. Suðuroy, Sandoy, Vágar og Norðstreym við Sunda kommunu fáa hvør sítt umboð. Norðoyar og Eysturoyar uttan Sunda kommuna fáa tvey umboð, og Tórshavnar kommuna fær trý.

Onnur stór broytingin er um heimildir at taka avgerðir um fíggjarætlanir. Her verður heimildin flutt frá umboðsnevndini (t.v.s. aðalfundinum), til stýrið ella tað, sum framyvir skal vera nevndin.

Verður hetta gjørt, so merkir tað, at kommunurnar verða settar av her. Hetta er í stríð við tað, sum var gjørt tá SEV var stovnað og allar kommunurnar, sum vóru limakommunurnar, skuldu hava eina atkvøðu, tí tær eiga SEV.

Nú verða heimildirnar lagdar í stýrið og fíggjarætlanin verður gjørd har.

# Sær stórar vandar í broytingum

**– Tað er burtur úr vón og viti, at vit bara hava fingið tveir dagar at lesa viðtøkubroytingaruppskotið í gjøgnum. Tað átti at verið útsett til næsta fund, um ikki heldur tveitt burtur, sigur Hjalmar Jóhan Juul SEV-umboðsmaður hjá Funnings kommunu**

SEV
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Hjalmar Jóhan Juul, umboðsmaður fyri Funnings kommunu í SEV, hóvar ikki nýggja viðtøkubroytingaruppskotið, sum í morgin verður lagt fyri umboðsnevndanfundin hjá SEV.

– Tær minnu kommunurnar koma at missa alt valdið við nýggju viðtøkunum. Hetta er vandamikið fyri avgerðarrættin hjá smærru kommununum. Tá kann Tórshavnar kommuna uttan nakað krevja eykaaðalfund, meðan vit smærru mugu reisa land og ríki upp fyri gera tað sama, sigur Hjalmar Jóhan Juul.

Hann stúrir eisini fyri broytingunum, tá stýrið verður valt til nevnd.

– Sum er hava vit hvør sín lim, og tað hevur verið klandur við hesum sjey, so eg dugi illa at ímynda mær hvussu tað verður við ellivu limum, sigur Hjalmar Jóhan Juul.

– Stýrið, ella komandi nevndin, verður eisini suveren. Og soleiðis sum eg lesi uppskotið kunnu teir í prinsippinum selja SEV uttan víðari, sigur Hjalmar Jóhan Juul, sum dámar betur verandi reglugerðir.

– Tað er nógv tað frægasta sum er. Reglugerðirnar í dag er góðar, uttan næsta punkt í grein fýra, stykki tvey, sum eg havi lagt viðtøkubroytingaruppskot fram um fyri einum hálvum ári síðani.

– Tað er burtur úr vón og viti, at vit bara hava fingið tveir dagar at lesa hetta viðtøkubroytingaruppskotið í gjøgnum, sigur hann avgjørdur.

Hjalmar Jóhan Juul hevur lagt viðtøkubroytingaruppskot fram sum sigur, at valið fer fram á tann hátt, at umboðsnevndarlimir fyri hvørt øki sær seta upp valevni og atkvøða um hesi.